Útisetapresturin

Bergur Jacobsen er prestur hjá føroysku meinigheitini í Keypmannahavn, sum heldur til í Samuelskirkjuni á Nørrebrúgv. Í løtuni hevur presturin eina kirkju at vera í, sum er púra tóm, tí alt er tiki› innan úr henni vegna umvæling. Umframt arbei›i› í kirkjuni, er útisetapresturin sálarhir›i hjá føroyingum í danska høvu›ssta›num og hann vitjar eisini sjúklingar á Ríkissjúkrahúsnum.

ÚTISETALÍV
Dagfinn Olsen



Eg havi sjálvur uppliva› at ligi› sera sjúkur á sjúkrahúsinum í Havn og veri› álopin av fólki, i› vildi prædika fyri mær. Eg var ikki gla›ur fyri ta›. Eitt vanligt prát um ve›ur, vind, sey› og fisk kann eisini vera lekidómur hjá einum, i› liggur einsamallur, sigur Bergur Jacobsen (Myndir D. Olsen)

Bergur Jacobsen er prestur, or›blindur, horntónleikari og sálarhir›i. Solei›is kann hann stutt l‡sast. Hann hevur roynt ymiskt á yrkislei›síni. Hann hevur veri› sjómansprestur í Onglandi, prestur í Føroyum, útvarpsma›ur og landsst‡risma›ur.

Hann hevur í nøkur ár veri› prestur hjá føroysku meinigheitini í Keypmannahavn, sum heldur til í Samuelskirkjuni á Nørrebrúgv.

Samuelskirkjan er opin hvønn dag frá 10 til 14 og ta› hendir meira enn so, at fólk koma innar og seta seg , bert fyri at fáa eina fri›arliga løtu.

Sjúk og heimleys

Í løtuni fara allar kirkjuligar handlingar fram í kirkjukjallaranum, Krypten, tí inni í sjálvari kirkjuni er ikki nógv at fara eftir. Har er púra tómt, um ein ikki roknar uppí okkurt málingablikk og onkran trappustiga. Har fer stór umvæling fram og tí er kirkjan í løtuni stórt sæ› bert f‡ra veggir.

– Eg er umlei› helvt um helvt, hóast ta› ikki júst er eftir rætta kvotab‡tinum. Men hatta vi› kvotaprestum virkar ikki heilt, so í veruleikanum er eg hálvur danskur prestur og hálvur føroyskur. Eg havi tvær meinigheitir, ta føroysku og ta donsku, sigur Bergur Jacobsen

Tvey meinigheitsrá› eru. Eitt danskt og eitt føroyskt, men danska rá›i› hevur ábyrgd av bygningunum, me›an føroyska rá›i› bert hevur ábyrgd av føroysku meinigheitini. Ein limur í føroyska rá›num er eisini umbo› í danska rá›num og er sostatt millumli›. Meinigheitirnar eru javnbjó›is hvørjari a›rari og eru felags um kirkjuna.

– Fastar gu›stænastur eru og beint vi› sí›una av kirkjuni er eitt stórt ellisheim, so nógvar danskar jar›arfer›ir eru, men eisini føroyskar. Eg havi eisini andaktir annan hvønn t‡sdag á Hotel Thorshavn. Vit b‡ta hetta vi› Brø›rasamkomuna. Eg vitji eisini á Ríkissjúkrahúsinum og haldi serliga eyguni vi› fólki, i› liggja longi. Tey sum bara koma og fara hava vónandi ikki brúk fyri mær, men senda vónandi bo›, um so er. Eisini er naka› at gera innan fangahúsverki›, sigur Bergur Jacobsen

– Og eisini eru føroyingar, i› ikki eru so væl fyri og føroyingar, i› eru heimleysir, sum eg havi samband vi›, sigur Bergur Jacobsen, sum sostatt n‡tir fittan part av síni tí›, sum sálarhir›i.

– Um vetrarnar plaga vit at hava føroyskan mat, men ta› liggur á láni nú, tí kirkjan ver›ur umbygd, sigur Bergur Jacobsen, sum ikki heldur stóran mun vera á prestastarvinum í Danmark og í Føroyum, um ein ikki tekur vi› serligu økini hjá útisetaprestinum.

Leyp ikki á seingjarliggjandi fólk

– Ta› eru fólk, sjúklingar, sum koma ni›ur, og ongan hava vi› sær. Nøkur teirra liggja longi og tey eru rættiliga einsamøll. Ta› er tann ólukkuliga stø›a íkomin, at telefonskipanin á Ríkissjúkrahúsinum er broytt solei›is, at nú kann ein ringja út, men ringjast kann ikki inn úr Grønlandi og Føroyum. Vit arbei›a vi› at fáa hetta broytt, tí tann telefonin er rættiliga d‡r. Annars vildi eg fegin, at sjúklingar sum liggja her, og hava brúk fyri at práta, gera vart vi› seg. Ta› n‡tist ikki at vera tí teimum tørvar ein sálarhir›a, men kanska hava tey bert brúk fyri einum føroyskum práti. Ta› er ofta tilvildarligt, hvønn vit koma framá. Ofta er ta› eftir vitjanir á Hotel Thorshavn, at vit hitta fólk, men hvussu so vi› teimum, i› ikki koma á Hotel Thorshavn og sum vit einki vita um?. Kanska eru ta› júst tey, i› tørva okkum mest, sigur Bergur Jacobsen.

– Fólk mugu ikki smæ›ast vi› at siga frá, tí eg komi ikki bert til teirra, sum liggja til ta› sí›sta. Eitt vanligt prát um ve›ur, vind, sey› og fisk kann eisini vera lekidómur hjá einum, i› liggur einsamallur, sigur Bergur Jacobsen

Hann leggur dent á, at hann á vitjanum sínum á Ríkissjúkrahúsnum fer at vitja fólk og ikki fyrst og fremst at prædika fyri teimum.

– Hetta má ein føla seg fram til, tí ta› skal helst vera eitt ynski frá teimum. Eg havi sjálvur uppliva› at ligi› sera sjúkur á sjúkrahúsinum í Havn og veri› álopin av fólki, i› vildi prædika fyri mær. Eg var ikki gla›ur fyri ta›. Vi›komandi kundi fyrst sett seg ni›ur og til dømis ómaka› sær at funni› útav hvør eg var og so framvegis, heldur Bergur Jacobsen, i› ikki metir, at ein hevur loyvi at leggjast á fólk, i› liggja í eini song.

Bergur Jacobsen hevur eisini gu›stænastur a›rasta›ir, enn í Samuelskirkjuni. Hann fer›ast til dømis til Jyllands og Bornholm at halda gu›stænastur. Eisini eru nógvar vígslur og danski deknurin á sta›num er konsulentur hjá Kirkjumálará›num fyri føroysk nøvn, so har er eisini eitt starvsøki hjá føroyska prestinum.

Í løtuni er stórt umvælingararbei›i í gongd og presturin kann sko›a eina tóma kirkju, men hon ver›ur væntandi klár til jóla. - Eg kundi hugsa› mær at komi› aftur til Føroya, men eg havi tann trupulleika, at eg er or›blindur. Føroyskir prestar skulu føra kirkjubøkur og har skulu eingi mistøk vera, sigur Bergur Jacobsen

Er or›blindur

Bergur Jacobsen hevur veri› 5 ár í starvinum í Keypmannahavn, og sum vanligt hjá donskum prestum, hevur hann fastar telefontí›ir, har hann er at hitta, men annars er ilt at siga neyvt, hvussu ein dagur hjá hjá honum sær út.

Bergur hevur roynt eitt sindur av hvørjum. Hevur veri› sjómansprestur í Onglandi, prestur í Føroyum, útvarpsma›ur og landsst‡risma›ur.

– Ert ta› so, sum tú onkutí› hevur ført fram, at tú metir, at ein eigur ikki at sita ov longi í einum starvi, tí so er vandi fyri at »sovna«?

– Hugsar ein fyrimyndarligt, so eigur ein ikki at ver›a ov longi í einum sta›. Hetta er galdandi bæ›i sum tí›indama›ur og sum prestur. Eg haldi, at í hvussu er meinigheitin hevur gott av at síggja n‡tt andlit og hoyra eina n‡ggja rødd. Fyrr var eisini lætt at flyta, men so er ikki longur. Nú eru nógv um bo›i›, so nú kann ein blíva hangandi, uttan at vilja ta›. Men eg var útvarpsma›ur frá 1988 og til 1995, og eg kendi, at eg hev›i givi› nóg miki› av mær sjálvum og var bangin fyri at koyra upp í saman. Men hev›i eg kunna› skift til tí›indadeildina, so hev›i eg kanska hildi› fram, men eg var politiskt merktur og metti ikki at ta› hóska›i at koma úr landsst‡rinum og inn á tí›indadeildina, sigur Bergur Jacobsen.

– Eg kundi hugsa› mær at komi› aftur til Føroya, men eg havi tann trupulleika, at eg eri or›blindur. Føroyskir prestar skulu føra kirkjubøkur og har skulu eingi mistøk vera. Eg var prestur í Sandoynni og hjá einum vanligum fólki var eingin trupulleiki at føra kirkjubók, men hjá mær var ta› stórarbei›i. Fleiri kladdur og sí›ani at føra yvir. Ta› átti ikki at komi› millum meingheit og prest, at ein er or›blindur, men solei›is er ta›. Eg eri sera takksamur fyri n‡ggju telduor›abøkurnar og endiliga tori eg at lata eitt handrit frá mær vi› gó›ari samvitsku, sigur Bergur Jacobsen.

Er hetta ein trupulleiki, i› hevur fylgt tær alt lívi› og undir lestrinum?

– Eg lesi seinni, enn fólk flest. Lesa konan og eg ein felags tekst, so lesur hon tekstin uppá eitt eygablikk, men hjá mær gongur seinni. Eg plagi at siga, at nógv fólk duga at stava, men duga ikki at skriva. Og kanska eru eisini ta› tey, i› duga at skriva, men ikki at stava, skemtar Bergur Jacobsen, i› heldur trupulleikan ver›a, at ein sum or›blindur hevur havt ringa samvitsku av at lata ein tekst frá sær.

– Ta› hevur nú ikki veri› so øgiliga illa statt vi› mær. Eg havi altí› duga› at lisi›. Men ta› gongur ikki, um ein skal skriva naka›, sum skal vera so rætt, sum ein kirkjubók, sigur Bergur Jacobsen, sum fegnast um n‡ggju teldukirkjubøkurnar.

– Eg kundi hugsa› mær at komi› aftur til Føroya. Eg eri føroyingur og ta› fellur lættast at práta vi› føroyingar. Men hinvegin dámar mær væl donsku gu›stænastuna, sum er ø›rvísi, enn tann føroyska. Men hana hev›i eg kunna› tiki› vi› mær til Føroya. Í donsku gu›stænastuni ver›ur meira roynt, n‡ggj løg og leikfólk taka eisini meira lut, sigur Bergur Jacobsen, i› eisini nevnir alt ta›, i› gongur fyri seg í kirkjuni umframt gu›stænastu, so sum andakt tvær fer›ir um vikuna, spælistova, eldrafundir, kór og ymsir felagsskapir halda eisini til har.

Samuelskirkjan er opin hvønn dag frá 10 til 14 og ta› hendir meira enn so, at fólk koma innar og seta seg, bert fyri at fáa eina fri›arliga løtu.

N‡ggj urga er keypt til Samuelskirkjuna, i› er størri, enn sí›ugøtukirkjur vanliga fáa. - Henda urga var yndisurgan hjá urguleikaranum Viderø, i› var hálvur føroyingur, og urguleikarin í Samuelskirkjuni er næmingur hjá Viderø, sigur Bergur Jacobsen,

Søgulig urga

– Kirkjan hevur eisini veri› forsømd. Men nú er stór umvæling í gongd, i› skuldi ver›a li›ug 1. juni, men nú vóna vit at fáa kirkjuna aftur til 2. jóladag. Hon ver›ur vígd aftur 14. januar og tá ver›ur n‡ggja urgan eisini tikin í n‡tslu, sigur presturin, i› ikki dylir, at hann fegnast um júst urguna.

– Hetta er ein gomul/n‡ggj urga, sum hevur sta›i› í Angelholm Kirke í Svøríki. Ta› er ein danskt bygd urga og ta› er Hemmersham, i› hevur bygt, og hann hevur bygt nógvar urgur í Føroyum, men so vítt eg veit, so er tann einasta, i› spælir enn, urgan í Ebenezer í Havn, grei›ir Bergur Jacobsen frá.

– Hann var ein meistari til pípurnar, men ikki tøknina. Og í hesi urguni hevur hann bert gjørt pípurnar og hetta er ein urga vi› 34 røddum. Henda urga var yndisurgan hjá urguleikaranum Viderø, i› var hálvur føroyingur, og urguleikarin í Samuelskirkjuni er næmingur hjá Viderø, sigur Bergur Jacobsen, og leggur afturat, at orsøkin til, at tey fingu loyvi til at keypa urguna var, at ein kendur danskur urguleikari og komponistur hev›i tilkn‡tt til urguna.

Urgan er keypt fyri 50.000 krónur og ver›ur sett upp fyri 1,2 milliónir.

– Sostatt er ta› nærum ein n‡ggj urga, vit fáa. Men ein n‡ggj urga vi› 34 røddum kostar í dag einar 10 milliónir og ein sí›ugøtukirkja, sum okkara, hev›i annars ikki fingi› eina urgu vi› meira enn 19 røddum, sigur Bergur Jacobsen, i› fegnast um úrsliti› og sparda peningin.

Bergur Jacobsen væntar ikki, at hann tekur stig til naka› heilt n‡tt vi›víkjandi yrkislei›ini, uttan kanska at venda heimaftur einafer›. Fyri ári sí›ani var› hann raktur av sjúku, men kom væl fyri seg, hóast orka ikki er til ta› sama, sum á›ur.

Útisetapresturin vónar, at fólk venda aftur til kirkjuna, tá hon er li›ugt umvæld, tí hann heldur seg hava merkt, at me›an hildi› hevur veri› til í kirkjukjallaranum, er tali› á kirkjugangarum falli›. Eisini vónar hann, at ungfólk taka vi› og taka undir og eisini, at tey koma vi› uppskotum um, hvussu kirkjan kann n‡tast, tí øll eru vælkomin at n‡ta kirkjuna.

JÓLAKORT

Kom inn og fá tikið eina fitta mynd í hugnaligum jólaumhvørvi
10 jólakort v/brævbjálva
Fotografering íroknað.................... 119,-
Fylgjandi jólakort, kr. 9,- fyri hvørt
Eftir egnum negativi
10 jólakort v/brævbjálva...................... 89,-
Fotodeildin, tel 35 35 34
SMS · Tel 35 35 35 · Fax 35 35 36
E-mail: tryarin@post.olivant.fo
3arin